Álit

í

løgtingsmáli nr. 106/2020: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin) (um at seta í gildi broytingar í 8. vinnufelagadirektivinum o.a.)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 17. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Skráseting Føroya og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Johan Dahl, Bjarni Hammer, Beinir Johannesen, Jákup Mikkelsen og Henrik Old) vísir á, at tað er týdningarmikið, at føroysk lóggáva á hesum øki fylgir altjóða lóggávu, so føroyskar grannskoðarafyritøkur framhaldandi kunnu átaka sær uppgávur fyri fyritøkur, herundir føroyskar fyritøkur, ið virka á altjóða stigi.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Bjørt Samuelsen og Bjarni Kárason Petersen) vísir til viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 107/2020: Uppskot til løgtingslóg um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga (PIE-fyriskipanin), og tekur við teimum viðmerkingunum ikki undir við málinum, og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 21. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	